# Madonna útgav føroyska bók í París




Ensku rósurnar eftir Madonnu spruttu í París mánadagin

**Ensku rósurnar hertóku Frakland mánadagin. Talan er ikki um enskar fótbóltsspælarar, karamellur ella urtagarðsblómur, men heimsgitnu Madonnu, sum hevur lagt á annan bógv. Hesaferð er talan um eina barnabókaútgávu. Og føroyingar vóru mitt í rokanum**

BÓKAÚTGÁVA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

**París:** Undir stórum »festivitas« í býi býanna gjørdi Madonna sína entré til enn eina nýggja listagrein seinnapartin mánadagin. Tá útkom barnabókin »English roses« í meira enn einari millión eintøkum, í meira enn 100 londum á meira enn 30 málum.

Sermerkt er, at hendan sama dagin kemur bókin út á føroyskum, ið man vera so nógv tað minsta málið til bókaútgávuna yvirhøvur, og tí vóru føroyingar eisini til staðar, tá bókin alment varð løgd fram.

Niels Jákup Thomsen, leiðari av Bókadeild Føroya lærarafelags, sum gevur bókina út í Føroyum, og Kári Árting, bókahandlari, vóru bodnir til París til stóra hátíðarhaldið, sum seint mánakvøldið skuldi enda við einum gardenparty saman við sjálvari Madonnu. Hvussu tað spældi av, hoyra vit meira um seinni.

Høvuðspersónurin sjálvur, Madonna, hevur dugað væl at sett eitt show upp til stóra dagin, tá hon debuteraði sum barnahøvundi. Fyrst var stórsligin tíðindafundur á Hotel Ritz. Og seinni varð reyða teppið rullað á gøtuna í París, tá poppdrotningin vísti seg, og myndamenninir blitsaðu, so sjálvt smílið hjá Monu Lisu stirðnaði í Louvre.



### Fyri børnini

Madonna hevur altíð spælt ein dupultleiklut. Líka frá tí óseku, óspiltu jomfrúnni til tað frígjørdu og ótemjandi kvinnuna, ið tekur tað, sum hon vil hava. Hon spælir upp á temaið, sum til allar tíðir hevur hugtikið og hótt - serliga menn.

Seinasta útgávn hjá henni var myndabókin »Sex«, har hon sjálv var myndevnið. Og nú er hon farin heilt í hina grøvina: At skriva til børn. Á tíðindafundi í París mánadagin greiddi Madonna sjálv frá, hví hon er farin at skriva ævintýrkendar bøkur:

- Av tveimum orsøkum. Eg havi nú tvey børn, og tey eru ein stór íblástrarkelda hjá mær. Eg byggi sjálv á andalig virði og hava lært nógv millum ár og dag. Millum annað týdningin at býta við onnur og at eggja onnur. Børn eru náttúrliga opin, so eg hugsaði, at eg vildi býta tað við tey, sum eg sjálv havi lært, sigur Madonna.

### Viðger øvund

Bókin snýr seg um fýra vinkonur, Nicole, Amy, Charlotte og Grace, sum eru 11 ára gamlar og bestu vinkonur. Tær eru sum límaðar saman, skrivar Madonna, og tær eru allar eitt sindur øvundsjúkar inn á eina aðra gentu í grannalagnum. Bina er at síggja til perfekt, men tá ein álva kemur upp í leikin, vísir tað seg, at alt er ikki, sum tað sýnist. Tað er hendan lærdóm, Madonna vil geva víðari.

- Sum barn upplivdi eg svartsjúku og øvund móti øðrum gentum. Eg var øvundsjúk, tí tær høvdu mammur, vóru vakrari ella ríkari enn eg. Tað er ikki, fyrr enn tú gerst vaksin, at tú finnur útav, hvussu stórt spill, slíkar kenslur eru. Nú upplivi eg tað øvugta. Sjálvandi. Onnur øvunda mær, ella øvunda lítlar gentur mína dóttur og frysta hana úti, sigur hon.

Madonna sigur, at dóttirin hevur hjálpt at gera bókina, sum er ognað børnunum Lolu og Rocco. Allur peningurin fer til at hjálpa børnum.

### Fegið forlag

Tað er forlagið Callaway, sum gevur bókina út fyri Madonnu, og tað eydnaðist føroysku pressuni at fáa nøkur orð frá stjóranum, Nicholas Callaway. Hetta er fyrsta barnabókin í eini røð av fimm, sum Madonna gevur út á forlagnum, og Nicholas Callaway heldur góða grund vera til at halda, at fólkum fara at dáma bókina.

- Bókin eru klassisk við rótum í bestu barnabókatraditióni. Sum í øllum klassikarum gerast persónarnir tínir vinir, og tú fært hug at vitja teir aftur og aftur. Bøkurnar eru til at goyma og skatta, sigur Nicholas Callaway.

Spurdur, hvussu tað var at arbeiða saman við Madonnu, svarar hann, at hon er alt tað, sum tú kanst vóna frá einum kreavtivum samstarvsfelaga og rithøvundi.

- Hon er perfektionist, arbeiðir hart og hevur eitt gott eyga fyri smálutum. Hon er passjonerað og heilhjartað. Hon hevur framt hesa verkætlanina í tí andanum, at hon vil geva næsta ættarliðnum nakað. Eftir at hava arbeitt við henni í so nógv ár, veit eg, hví hon hevur fingið so stóra succes og undirtøku. Hon ger seg uppiborna til tað hvønn dag, sigur Nicholas Callaway.

Og so kemur spurningurin, sum ikki slepst undan, tá ein bókaútgevari gevur eina barnabók út hjá einari megastjørnu: Er tað veruliga Madonna, sum hevur skrivað?

»Yes. Of course,« svarar Nicholas Callaway avgjørdur. Og sjálvandi trúgva vit tí.



Hermann Oskarsson um bommgjaldið:

# Økt meirvirðisgjald skilabetri

**Góðgæti og sodavatn verður í framtíðini dýrari hjá føroyingum at fáa hendur á. Avgjaldið á søtmeti skal geva landskassanum góðar 20 mio. í inntøkum. Formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson heldur lítið um avgjaldið, tí politikkarnir leggja seg út í, hvat fólk skulu keypa, og tað er ikki rætt.**



*Landsstýrið ætlar at leggja avgjald á góðgæti og sodavatn. Hetta skal eftir ætlan geva landskassanum 20 mio. krónur í inntøkum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

AVGJALD Á SØTMETI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin*

Fríggjadagin kom fram í Sjónvarpi Føroya, at landsstýrið í løtuni arbeiðir við at hækka avgjaldið á søtmeti. Hetta hevur við sær, at góðgæti og sodavatn verður dýrari at keypa í framtíðini

Grundgevingin hjá landsstýrinum er, at seinnu árini hava føroyingar etið meira og meira góðgæti, og fyri at tálma hesum, er neyðugt at hækka avgjaldið. Longu er greitt, at bæði føroyskt og útlendskt sodavatn verður eina krónu dýrari í framtíðini. Økta avgjaldið fer at geva góðar 20 mio. krónur í inntøkum í landskassanum.

Umframt avgjald á søtmeti, verður eisini eitt avgjald lagt á beriposar úr plastikki. Plastposar eru skaðiligar umhvørvið, og avgjaldið skal fáa føroyingar at keypa færri plastposar. Avgjaldið gevur landskassanum góðar 5 mio. krónur í inntøkum.

### Óheppið

Formaðurin í Búskaparráðnum og stjórin á Hagstovu Føroya, Hermann Oskarsson, heldur lítið um avgjaldið á søtmeti. – Tað er keðiligt, at politikkararnir leggja seg út í, hvat fólk keypa. Hví velja politikkararnir ikki bara at økja um meirvirðisgjaldið, so økt avgjald rakar øll, so vit sleppa undan, at teir stýra, hvat fólk vilja keypa, sigur Hermann Oskarsson

Hann leggur eisini dent á hansara meining byggir á rein búskaparlig fyrilit. Hinvegin skilir hann væl sjónarmiðið um, at avgjaldið minkar um góðgætisnýtsluna, og harvið betrar heilsustøðuna hjá teimum ungu í Føroyum í dag.

Spurdur um, hvat hann heldur um avgjøld sum búskaparligt amboð, svarar Hermann Oskarsson, at tað er ein sannroynd í øðrum londum avgjøld verða nýtt, men hann er kortini talsmaður fyri, at politiski myndugleikin heldur seg burtur frá at stýra, hvat fólk keypur.

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, segði við Útvarp Føroya leygardagin, at orsøkin til avgjaldið var, at landskassanum vantar pening. Hermann Oskarsson vil ikki gera nakra viðmerking um orsøkina til, at landsstýrið ætlar at leggja avgjald á søtmetið og plastikkposar.

Andstøðutinglimur, Henrik Old:

## Kreppuloysn í inntøkutíðum

**Henrik Old heldur, at nú er botnurin náddur hjá samgonguni. Grundgevingin fyri, at avgjøldini skulu betra um heilsustøðuna og umhvørvið eru bert undanførslur fyri, at tað táttar í fíggjarliga**

AVGJALD Á SØTMEITI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í lesarabrævi í blaðnum í dag hartar Henrik Old landsstýrinum fyri ætlanirnar at økja avgjaldið á plastikkposum og søtmeti. Hann heldur, at nú má botnurin verða náddur. Henrik Old heldur tað verða óskiljandi, at landsstýrið setir kreppuloysnir í verk í inntøkutíðum.

Gaman í hava fiskaprísirnir verið hægri, men vit fiska sum ongantíð fyrr, og tískil átti tað ikki verið neyðugt við avgjøldum. Henrik Old sigur, at grundgevingin fyri, at avgjøldini betra um heilsstøðuna og umhvørvið eru bert undanførslur frá einum veruleika, ið er, at tað táttar í at fáa fíggjarlógina at hanga saman.

– Ein kann altíð finna upp á onkra undanførslu, men tað er sannroynd, at teir nýta ein kreppuloysn í góðum tíðum, sigur javnaðartingmaðurin.

### Ikki bíligari mjólk

Frá 1. januar í ár hækkaði mjólkarprísurin, og Henrik Old hevði betri skilt grundgevingina fyri avgjaldinum, var nýttur fyri at fáa mjólkarprísin niður aftur, men so er ikki.

– Mjólkarprísurin er farin nógv upp, og tískil hevði eg skilt, um økta avgjaldið varð nýtt til at gera mjólkina bíligari aftur. Landsstýrið hevur ongar ætlanir um at nýta øktu inntøkurnar í avgjøldum til at betra um heilsustøðuna og umhvørvið, men peningurin fer beinleiðis í landskassan, sigur formaðurin í vinnunevndini at enda.

# Rói Egholm á ting mikudagin

**Við góðari fyrireiking og samskipan sær nýggi tinglimur Tjóðveldisfloksins, Rói Egholm, ongar trupulleikar við, at tað verða tveir tinglimir, ið starvast á Farex. Hann sigur seg gleða seg til spennandi uppgávuna sum tinglimur.**

NÝGGJUR TINGMAÐUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Fríggjadagin gjørdist endaliga greitt, at tað verður Rói Egholm, ið verður nýggi tinglimurin hjá Tjóðveldisflokkinum.*
*Mynd: Savnsmynd*

Fríggjadagin fall endalig avgerð um leysa tingsessin hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymi. Annita á Fríðriksmørk verður væntandi hesa vikuna endaliga útnevnd sum landsstýrismaður í Mentamálum, og stóri spurningurin hevur verið, hvør skuldi taka tingsessin hjá henni.

Finnur Helmsdal var næstur í røðini, men fríggjadagin boðaði hann leiðsluni í Tjóðveldisflokkinum frá, at hann ikki ynskti at taka við tingsessinum. Grundgevingin var, at honum dámdi væl á Føroya Barnaheimi og býráðssessurin í Havn hevði eisini stóran áhuga.

Nú Finnur Helmsdal ikki tekur við tingsessinum, verður tað Rói Egholm, ið verður nýggjur tinglimur. Rói stillaði fyri fyrstu ferð upp til løgtingsvalið í 2002, og hann fekk 116 atkvøður.

### Spennandi avbjóðing

Rói Eghom sigur seg vera fegnan um at hava fingið møguleikan at fara á ting, og hann gleðir seg at fara undir spennandi uppgávuna. – Eg eri sætti maður hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymi, og tí kann ikki siga, at eg hevði væntað at fingið møguleikan at fara á ting. Nú havi eg so fingið møguleikan, og eg taki av, sigur Rói Egholm.

Rói Egholm starvast dagliga á Farex. Á arbeiðsplássinum starvast ein annar tingmaður, nevnliga sambandstingmaðurin, Kaj Leo Johannesen. Spurdur, um tað fer at ávirka arbeiðið hjá Farex, at tveir mans eru nógv upptiknir av tingarbeiði, svarar Rói, at teir hava tosað saman, og við góðari fyrireiking og samskipan eigur tað ikki at verða nakar trupulleiki hjá fyritøkuni.

Fyrstu ferð, Rói Egholm verður at síggja í tinginum verður mikudagin klokkan 13.30, tá tingfundur aftur verður á skránni.

## Ongin Zlatko á Platform

Tað vóru óivað nógv, sum høvdu glett seg til at síggja Zlatko Buric á Platform í vikuskiftinum, tí eftir ætlan skuldi vælumtókti Zlatko, ið er kendur frá Tuborg lýsingunum, standa handan barrina á dansistaðnum, Platform leygarkvøldið.

Ringu floglíkindini leygardagin høvdu við sær, at Zlatko ongantíð kom til landið, og enn er ikki greitt, um hann hevur ætlanir um at koma til Føroya eina aðru ferð.